Kommunufelagið

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
EIRARGARÐUR 2
100 TÓRSHAVN

Dagfesting
11. august 2015

Okkara j.nr.
15/02649-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
15/00152-7

***Viðv. Uppskot til kunngerð um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið***

Heilsumálaráðið hevur 23. juli 2015 sent Kommunufelagnum uppskot til kunngerð um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið, til hoyringar.

Kommunufelagið fegnast um, at øll nú fáa lógartryggjaðan rætt til endurvenjing á sjúkrahúsi. Kommunufelagið metir tó ikki, at uppskotið er nóg greitt, tá ið tað snýr um markið millum endurvenjing á sjúkrahúsinum og ta endurvenjing sum skal fara fram hjá ávikavist í Allmannaverkinum og kommununum. Ikki minst tykist ógreitt hvør skal taka avgerðina um møguliga framhaldandi endurvenjing uttanfyri sjúkarhúsverkið.

Sambært § 6 stk. 2 so skal endurvenjing veitast við støði í endurvenjingarætlanini. Endurvenjingarætlanin verður sambært § 4 stk 2 gjørd í samráð millum læknan, sjúklingin og mørgulig avvarðandi. Við øðrum orðum so hava kommunurnar og Almannaverkið skyldu til at veita eina endurvenjing, sum hesir partar ikki hava havt møguleika at umrøða ella ávirka.

Kommunufelagið mælir til at hetta verður broytt soleiðis, at endurvenjingarætlanin verður gjørd í samráð millum sjúkrahúsið, tann einstaka og tann myndugleikan sum skal standa fyri framhaldandi endurvenjingini, tað verður seg Almannaverkið ella kommunurnar.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna

Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri